# Vit verða ríkari tá...

Í júst lidnari frágreiðing eru sviar komnir eftir, at fólk á Svøríki flyta minni enn tey gjørdu í seksti-árunum. Sonevndi mobiliteturin — at flyta til annan stað, at fara í aðra vinnu o.s.fr. — er spakuliga, men støðugt minkaður øll árini. Teir trúðu annars og vónaðu, at fólk fóru at nýta framstigini og øktu møguleikarnar at skapa sær eina betri og ríkari framtíð við at flyta og fara í nýggjar vinnur, ið góvu størri avbjóðingar enn farandi vinnurnar.

Millum orsakirnar til minkaða mobilitetin nevna sviar, at lutfalsliga talið á yngri fólki er minkandi; og eldri vit gerast, minni verður hugurin at flyta og taka við nýggjum avbjóðingum. Hækkandi útbúgving veksur hin vegin um mobilitetin, men í meðal tykist útbúgvingarstøðið ikki hækkað seinnu árini. Triðja orsøk hongur eftir øllum at døma uppi í, at báðir hjúnaðarfelagar arbeiða, og truplari er kanska hjá báðum at finna eggjandi arbeiði á sama staði, um tey flyta. Størsta forðingin tykist tó vera høga skattatrýstið, sum ger, at tað liggur ongin peningaliga ríkari framtíð í nýggjum avbjóðingum.

### Samveldi, lond, landspartar og býir kappast um kapital og vitan

Tað er skjótt langt síðan, at gamla býtið av framleiðslufaktorum, t.e. viðurskiftum, sum liggja til grund fyri framleiðslu og vælferð í einum landi, v.ø.o. í jørð, herundir rávørur, arbeiðsmegi og kapital, var ov einfalt. Tað hevur kanska størri týdning at býta hesar framleiðslufaktorar eftir, í hvønn mun teir eru flytiligir og í hvønn mun staðbundnir.

Flytiligari ein framleiðslufaktorur er, størri er virði á honum, og meira er hann eftirspurdur hjá teimum, sum sakna hann. Jørð, rávørur og ikki flytiligur kapitalur fáa alt minni virði í framleiðsluni. Einans í tann mun marknaður er fyri teimum vørum, sum hesir faktorar kunnu medvirka til at framleiða, og um dugnalig arbeiðsmegi er at evna hesar vørur til nýtslu fyri marknaðin, hava faktorarnir nakað virði. Vit hava sjálvi merkt upp á okkara kropp, at tað vit hildu hava virði, knappliga var at kalla virðisleyst. Harafturat kemur, at vørur, ið fremst byggja á hesar faktorar, verða alt minni eftirspurdar.

Við frammanfyri nevndu gongd roynir kapitalurin at gera seg so óheftan av staði og vinnu sum yvirhøvur til ber. Virðis- og partabrævahandil gera hetta møguligt, og tað ræður tí um hjá fyritøkum at fáa partabrøv síni góðkend á virðisbrævamarknaðum, so tey við víðkan av partapeninginum kunnu fáa neyðugan kapital tilførdan til menning og vøkstur av fyritøkuni.

Gongdin í avlopi hjá fyritøkuni ger av, um kapitalurin varðveitir áhugan í at eiga virðisbrøvini í einari fyritøku ella roynir at sleppa sær av við tey, áðrenn tapsvandin gerst ov stórur.

Møguleikarnir fyri avlopi hjá einari fyritøku velst um leiðsluna; hvussu hon skipar fyritøkuna, og hvussu fyriskipanin tryggjar støddina á virðisøking í mun til talið á arbeiðsfólki í fyritøkuni. Tað slepst ikki uttan um, at dugnaligari og meira útbúgvin arbeiðsmegin er, og virknari leiðslan er — bæði í tí dagliga men ikki minni í at fyrireika fyritøkuna til framtíðar krøv — størri gerst avlopið, virðismiklari gerast partabrøvini í fyritøkuni, og størri verða positivu árinini á samfelagið av fyritøkuni.

Men eisini arbeiðsmegin sum framleiðslufaktorur verður mett eftir hugi og evnum at flyta — í annað stað og í aðra vinnu. Ófaklærd og óútbúgvin arbeiðsmegi er aloftast ein ikki flytiligur framleiðslufaktorur, sum verður goldin við lágum og svikaligum prísi. Faklærd og væl útbúgvin arbeiðsmegi haraftur ímóti hevur lætt við at flyta bæði í annað land og í aðra vinnu. Dugnaligari hon er, hægri prís fær hon, og fyritøkur, ið hava tørv á meira kapitali til vøkstur og menning, kappbjóða fyri at fáa hendur á hesari arbeiðsmegi.

Eitt samfelag við fáum ella fækkandi tali av fyritøkum, sum skapa virðisøking, er illa fyri. Staðbundnu framleiðslufaktorarnir megna ikki at halda búskapinum uppi, og samfelagið er illa fyri, tá tað ræður um at tryggja sínum gomlu, vinnuleysu, veiku og sjúku mannsømulig kor. Unga fúsa fólkið flytir burtur, stóra fjøldin av ófaklærdum fólki missir arbeiði, og lutfalsliga talið á gomlum gerst órímuliga stórt í mun til orkuna hjá samfelagnum at veita teimum eftirløn og góð ellisár.

Ei dáni í, at býir, landslutir og lond, ja enntá samveldi leggja so stóran dent á at skapa so góðar umstøður sum gjørligt fyri kapitali og dugnaligari arbeiðsmegi at koma til og støðast í teirra samfelag, hvussu lítið hetta enn er. Fyritøkurnar og fyritøkuleiðslurnar fær samfelagið gjørt lítið við, men umstøðurnar hjá teimum at virka til frama fyri vøkstur og menning av teimum sjálvum kann samfelagið royna at gera so frægar sum til ber.

### Reyvafall í oljuni?

Fyri stórthundrað árum síðan menti føroyska samfelagið seg við ferð úr bónda- og landbúnaðarsamfelagnum og inn í eina fiskivinnutíð. Í 1880-unum var føroyski útflutningurin eftir tátíðar meti hávirðisøktar vørur úr ull, men longu í 1930-unum var útflutningurin broyttur so nógv, at hann eftir tátíðar meti at kalla bert var hávirðisøktar fiskavørur og ein viðfáningur av óvirkaðari ull. Tað fyri okkum í dag at síggja ófatuliga áræði og viljin hjá privatum og vinnulívi í tjúgu- og tríatiárunum at føra okkum í røttum tíma inn í ídnaðarsamfelagið miseydnaðist, eitt nú av kreppu og øðrum veraldarbardaga. Og aftaná kríggið fekst ikki lag á.

Tað almenna kom so upp í — fyrst seinast í fimtiárunum við stuðulslánsskipan og seinni við sekstimiljónagrunni, báðar skipanir vælmeinandi, men tær tóku støði undir kappingarførari vinnulívsmenning. Nú kundi hon bert henda við stuðli og fyriskipan landsins.

Nú sjeyti ár eftir hava vit aftur fingið møguleikan at gera eitt risalop frameftir, sum kann tryggja okkum eitt samfelag, har tey ungu síggja sær eina ríka og avbjóðandi framtíð í Føroyum, og har tey gomlu kunnu gleða seg til at bjóða sínum barnabørnum góðar løtur í uppvøkstri saman við teimum.

Møguleikin liggur sjálvsagt í oljuvinnuni, sum kanska kann taka seg upp við Føroyar. **Ikki í oljuni**, tí olja er ein skitin, kleimin og umhvørvisskaðilig evja, sum eina tíð frameftir er virðismikil í orkuframleiðslu. Hon hevur tískil eisini lágan og svikaligan prís, verður hesin prísur ikki hildin uppi av tilvildarligum ella tilætlaðum marknaðarskorti ella av skatti sagdur at tæna umhvørvi.

Møguleikarnir liggja í, at frálandavinna við Føroyar kann geva føroyskum fyritøkum tiltrongda høvið til at menna seg úr handaligum framleiðslu- og tænastuvirksemi í hátøkniligt tænastu- og menningarvirksemi. Úr virksemi, sum gevur lágt og svikaligt meirvirði, í virksemi við høgari meirvirðisøking. Úr virksemi, sum dúvar upp á ófaklærda arbeiðsmegi, sum er nøgd við óstøðug arbeiðspláss, í virksemi, sum bert kann klára seg við dugnaligari leiðslu og arbeiðsmegi, sum støðugt er í útbúgving og setir krøv um eggjandi arbeiðsuppgávur.

Føroyskar fyritøkur hava longu mentalt fyrireika seg til at taka av hesum møguleikum og avbjóðingunum í frálandavinnuni. Tí bjóðaðu 24 fyritøkur seg fram á ONS 2000 í Stavanger. Tær vilja uppí; royna seg og gerast dugnaligir samstarvspartar í oljuvinnu við Føroyar og úti í heimi. Tær vilja vinna pening og tryggja sær og sínum starvsfólkum góð og lønandi arbeiðskor.

Fyritøkurnar vita fullvæl, at royalty og hækkaður partafelagsskattur á oljufeløg ikki tænir teirra áhugamálum, Hesar inntøkur tæna heldur ikki áhugamálunum hjá starvsfólkunum og teirra avvarandi. Hesar eykainntøkur skulu annaðhvørt verða brúktar eftir politiskum áhugamálum, ella



tær skulu goymast burtur til framtíðar politisk endamál.

Verða eykainntøkurnar brúktar nú, fer samlaða nýtslan í samfelagnum langt út um tað, sum landsbúskaparliga er forsvarligt, og nýtslan fer til at halda uppi framleiðslu og virkjum, sum ikki eru kappingarfør. Eins og í áttati-árunum fer henda meirinýtsla at máa støðið undir meirvirðisskapan í samfelagnum og harvið undir framtíðar livilíkindum í Føroyum.

Og verða eykainntøkurnar goymdar til framtíðar nýtslu, tá tað almenna heldur, at nú er tíðin komin til at seta á tær ella brúka møguligar rentuinntøkur til eitthvørt samfelagsgagnligt endamál, tryggja løgting og landsstýri sær við hesum eitt framtíðar vald, sum í roynd og veru ikki er tilætlað teimum í einum demokratiskum samfelag. Vald teirra kemur at liggja í, at vit í dag hava tryggjað teimum at sleppa at sita á einum peningakassa, sum allir borgarar eiga part í, men ikki sleppa at nýta, sum teir halda vera skilabest. Politiska kjakið í landinum fer at snúgva seg fyrst og fremst um, um tíðin ikki er komin í størri muni at brúka av hesum peningi til átrokandi endamál, sum mugu haldast liggja á láni. Eins og í Noregi sleppa borgarar í kommunum og fylkjum ikki at taka seg saman um at tryggja góða sjúkrarøkt, góðar skúlaskipanir, ellis- og barnarøkt o.s.fr., tí staturin hugsar bert um at stýra oljumiljardunum.

Politiski hugurin í Føroyum at skifta landsbúskaparliga og vinnuliga skaðiliga stuðulin úr danska ríkiskassanum út við eina eins skaðiliga eykainntøku úr einari møguliga komandi oljuvinnu kann fáa teg at óttast, at lopið inn í eina hátøkniframtíð gerst eitt reyvafall í oljuni. Áhugin fyri at fáa landskassanum eyka inntøkur fara í besta fall bert at tryggja, at vit kunnu hava nógv fólk í almennari tænastu ella dúvandi upp á almennar inntøkuveitingar, og í versta fall verða forðingar fyri, at føroysk vinna kann menna seg at liva í hátøkni- og kunningarsamfelagnum. Úrslitið gerst tað sama, nøkur fá kunnu ríka seg upp, restin livir eitt staðbundið lív uttan meiningsfult arbeiði og framtíð, har ongin framfúsur og lívsavbjóðandi ungdómur støðast·

Í kanningini Føroya Framtíð — Hvat vilja føroyingar — sum varð gjørd á vári 1993 søgdu 87 % av føroyingunum, at teir ikki ynsktu at liva sum oljumiljóningar, um olju varð funnin við Føroyar, men at teir vildu sleppa at arbeiða. Teir svaraðu í somu kanning, hvussu mong ymisk arbeiði, teir kundu hugsa sær. Hugurin at arbeiða í hátøkni, kunningartøkni og tænastuvinnum lá kanska omanfyri samsvarandi tøl í okkara grannalondum og ber boð um, okkara framtíðar møguleikar í sambandi við oljuvinnuna eru stak góðir.

### Vit mugu ikki lorka okkum framtíðina av hondum

Føroyska samfelagnum standa ótrúliga spennandi møguleikar fyri framman. Tað ræður bert um hjá okkum at taka burtur allar tær mongu sjálvskaptu forðingarnar, ið gera at virkisfúsin ungdómur ikki sleppur framat, og at smáu og nýggju fyritøkurnar í Føroyum ikki sleppa at virka, mennast og skapa spennandi og góð arbeiðspláss fyri virkishugaðar føroyingar.

Fremsta og alrastørsta forðingin liggur í, at tað almenna situr á knappliga helvtini av øllum arbeiðsplássum í Føroyum, av hesum er kanska ein triðingur arbeiðspláss, sum í framkomnum londum rundan um okkum eru privatvinnulig arbeiðspláss, og í teimum mest framkomnu londunum eru um 20 % av teimum almennu arbeiðsplássunum annars farin úr statsligari ogn til kommunur ella felagsskapir, sum røkja tænasturnar við munandi hægri tænastustøði enn frammanundan. Vit eru skjótt á veg til at taka Grønland aftur. Ætlanin at seta eitt alment oljufelag á stovn er tískil demokratiskt og samfelagsmennandi burturvið; almenni og politiskt stýrdi eigaraskapurin gerst bert enn størri.

Ovurstóri almenni eigaraskapurin tryggjar samstundis, at tær fáu privatu familjufyritøkurnar kunnu einsamallar sita á restini og forða ungum framfýsnum at sleppa framat. Ein annars landsgagnlig fyritøka sum Atlants Kolvetni, sett á stovn í tøkum tíma, gerst ov lættliga skjóti vegurin til eitt 13-familju samfelag sum íslendska. Tað liggur í oligarkisku skipanini av felagnum, men eisini í at føroyingar uttanlendis ikki sleppa at vera partaeigarar. At vit fara at hava færri familjur enn í Íslandi er eyðvitað, men hetta ger ongan mun annars.

Verandi skipan ger, at tey fáu gerast ríkari og kunnu støðugt taka sær teir bestu bitarnar, tá tað almenna verður kroyst til at lata burtur av tí, sum tað av óhepnum viðurskiftum hevur lagt undir seg, og at tey mongu liva frá hondini til munnin uttan størri vónir og møguleika fyri einari ríkari framtíð.

Av tí sama ger verandi skipan, at samfelagið sum heild verður ov veikt at taka av stóru avbjóðingunum og missir menningarmøguleikarnar í at megna avbjóðingarnar. Vit lorka okkum framtíðina av hondum.

### Lat vanliga føroyingin fáa veruligan lut í felagsognini nú!

Seinastu tvey—trý árini hava fleiri røddir verið frammi um at selja burtur av teimum fyritøkum, sum tað almenna eigur, og at gera aðrar almennar stovnar til almenn partafeløg, sum so seinni kunnu verða seld. Seinast er sonevnda Caragata-frágreiðingin komin við somu staðiligu áheitan á landsins myndugleikar, tí hetta kann eisini vera við til at minka um almennu skuldina.

Tað eru sostatt nógvar orsakir til, at tað almenna eigur at sleppa sær av við tær mongu fyritøkurnar, sum tað beinleiðis ella umvegis eigur alt ella høvuðspartin í. Men skulu vit sum samfelag verða før fyri at taka av stóru avbjóðingunum og møguleikunum, sum liggja fyri framman, er avgerandi neyðugt, at so nógvir Føroyingar sum gjørligt eiga beinleiðis vinnuligan lut og vinnuliga ávirkan á gongdina, og á hvørjar avbjóðingar teir serliga vilja leggja seg eftir at taka av. Einki bendir á, at Føroyingurin ikki er førur fyri at umsita sín egna ognarlut við skili, tvørtur ímóti·

Tá Føroyingar í 1870-80-árunum fóru úr bóndasamfelagnum inn í fiskivinnutíðina, vóru tað traðarmenn, sum gingu á odda. Sum traðarmenn høvdu teir fingið føtur undir egið borð, fingið sjálvsálit og áræði og tordu at váða alt sítt uppsparda í vágiligu men vónríku fiskivinnuni. Fleiri máttu seta seg í stóra skuld fyri at sleppa burtur úr aftur, men teir flestu komu sær og sínum langt fram í samfelagnum.

Vit mugu tí vóna, at tíðindini eru sonn um, at Føroya landsstýri og løgting eru farin undir at fyrireika og fremja eina skjóta umskipan av sínum eigaraskapi av fyritøkum og stovnum, soleiðis at flest møguligir føroyingar gerast beinleiðis medeigarar í hesum. At myndugleikarnir eru komnir langt áleiðis við einari miðvísari ætlan um fremjanina av hesari sølu, so partabrøvini, í hvussu so er í fyrsta umfari, koma so vítt millum so mangar føroyingar, burturi og heima, sum gjørligt, og í so stórum pørtum av samlaða partapeninginum, at nýggju partaeigararnir fáa ávirkan á gongdina í felagnum.

Vit mugu eisini vóna, at fyrireikingarnar ikki verða seinkaðar av ætlanunum um ein virðisbrævamarknað í Føroyum. Ein slíkur fær ikki veruligan týdning, uttan so at vit eru fús og fyrireikað at lata allar føroyingar sleppa upp í part.



# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

# HB er fremst

*FSF fekk hósdagin svar frá løgfrøðingum sínum, sum siga HB vera fremsta lið í landskappingini.*

Jákup Mørk

Tað er nú greitt, at einki lið kann rópa seg føroyameistara í bestu mansdeildini, fyrr enn seinasta umfar í landskappingini er leikt.

Støðan kundi annars verið øðrvísi, um løgfrøðisligu ráðgevarnir hjá FSF mettu, at VB er fremsta liðið í landinum í løtuni.

### Mál einki at siga

Í tíðindaskrivi til fjølmiðlarar boðar FSF frá, at sambært løgfrøðisligu ráðgevum teirra, eru lógirnar soleiðis háttaðar, at sum støðan er í løtuni, er HB á fremsta plássinum.

Tað hevur annars verið ivamál um,hvussu grein 33, petti 2, í kappingarreglunum skal tulkast. Her verður boðað frá, at standa lið á jøvnum, eru innanhýsis dystir avgerandi fyri, hvat lið er fremri. Stendur framvegis á jøvnum, er málmunurin avgrandi.

Teir báðir dystirnir millum VB og HB í ár endaðu báðir javnir. 2-2 í Havn og 0-0 í Vági. Stóri spurningurin hevur verið, um tað eigur at vera vágbingum til fyrimuns, at teir hava skotið fleiri mál á útivølli, soleiðis sum tað eitt nú er galdandi, tá semifinalur og finalur í FSF verða leiktar.

Vágbingar hava hildið fast um, at útivallarmál eiga at telja við, meðan HB'arnir hava sagt, at hetta ikki stendur ávíst nakrastaðni.

### Bert stigini telja

Nú er so staðfest, at tað bert eru stigini, sum telja í hesum føri. Í niðurstøðuni verður sagt frá, at grein 33, petti 2, bert sigur at innanhýsis dystir eru avgerandi. Hetta verður tulkað soleiðis, at stig vunnin í innanhýsis dystum eru avgerandi. Skuldi talan verið um málmun, átti hetta at verið staðfest í reglunum.

Tað merkir samstundis, at mál als einki hava at siga í hesum føri. Heldur ikki, um talan var um at liðini høvdu vunnið hvør sínar dystir við fullkomuliga ymsum málmunum.

### B68 er framvegis við

At innanhýsis dystir á hendan hátt, merkir í løtuni, at HB er fremsta lið í landinum, men støðan kann broytast nógv um vikuskifti.

Um so er, at HB tapir grannauppgerðina móti B36, samstundis sum B68 vinnur á VB í Vági, er fullkomuliga vent í holuni. Tá verður B68 nr. 1, VB nr. 2 og HB nr. 3. Hetta tí innanhýsis dystir tá verða roknaðir, hvussu stigatalvan sær út, um vit bert rokna við teimum trimum oddaliðunum.

Her hevur B68 vunnið 7 stig móti VB og HB (treytað av sigri í Vági), VB hevur tá 5 stig móti HB og B68, meðan HB bert hevur vunnið 3 stig móti hinum báðum oddaliðunum.

Alt hetta eru tó bert hypotetiskar útrokningar, og tað kann væl vera, at støðan er ein heilt onnur sunnukvøldið, tá dystirnir eru leiktir á vøllinum.

Tað er jú fyrst og fremst har, at avgerðirnar skulu fella.

Skrivið frá FSF er annars soljóðandi:

»Við tað at ivi hevur tikið seg upp um, hvussu grein 33, stk. 2, í kappingarreglunum fyri fótbólt skal tulkast og, hvussu støðan í fótbóltslandskappingini skal gerast upp, tá liðini standa á jøvnum stigum, er Fótbóltssambandið komi til hesa niðurstøðu:

Reglan í grein 33, stk. 2, 1. petti. skal skiljast soleiðis, at hugt verður eftir, hvussu nógv stig viðkomandi lið hava fingið mótvegis hvørjum øðrum í innanhýsis dystum. Talan verður sostatt um eina uppgerð, har hædd ikki verður tikin fyri, hvussu málmunurin er millum viðkomandi lið.

Orsøkin til hesa niðurstøðu – sum annars samsvarar við orðaljóðið í greinini – er, at í 1. petti verður onki nevnt um málmun, og at málmununurin bert verður umrøddur í 2. og 3. petti. Orðingin í 2. og 3. petti gevur tí onga meining, um málmunurin eisini skal verða avgerðandi, tá uppgerðin fer fram sambært 1. petti.

Viðvíkjandi spurninginum um málmun annars er at viðmerkja, at í uppgerðinini av støðuni í landskappingini kann bert verða hugt eftir sjálvum málmuninum og, hvat liðið hevur flest vunnin mál. Ongastaðni í grein 33, stk. 2 hevur tað týdning fyri uppgerðina, um mál eru vunnin á útivølli ella ikki.«

# Gunnleyg fer til ÍBV

*Eftir royndarvenjing fyri viku síðani, hevur Gunnleyg Berg nú tikið avgerð um at fara til Íslands at royna hondbóltsevni síni*

Jákup Mørk

Fyri viku síðani skrivaðu vit, at tær báðar Gunnleyg Berg úr Neistanum og Annika Ljósstein úr Stjørnuni, fóru til Íslands, har tær í fyrsta umfari skuldu royndarvenja við íslendsku meistarunum úr ÍBV.

Umframt venjingar, vóru tær eisini við í tveimum venjingardystum, og eftir øllum at døma, hevur venjarin verið væl nøgdur við tað, sum tær báðar hava víst.

### Báðar bidnar

Í øllum førum fingu tær báðar hondbóltsgenturnar boð um at koma aftur til íslands, tí felagið var áhugað fyri hesum.

Endaliga avgerðin varð tikin hósdagin, og meðan Annika ikki hevði hug at fara, ivaðist Gunnleyg ikki, tá møguleikin var til staðar.

Longu mánadagin gongur leiðin til Íslands, har skjøtul verður settur á kappingarárið hósdagin.

Gunnleyg sigur við Sosialin, at hetta so avgjørt er ein møguleiki, sum hon sær fram til við stórum spenningi, men hon leggur tó afturat, at tað verður sera trupult at endurtaka gullmerkini frá undanfarna kappingarárið.

ÍBV hevur nevnliga mist fleiri týðandi leikarar í mun til í fjør, og umframt Gunnleyg eru í øllum førum tvær aðrar, sum júst eru komnar til felagið. Harumframt sóknast felagið framvegis eftir einum vinstra bakki, eftir at tað ikki eydnaðist at fáa Anniku til Íslands, men í løtuni er ikki greitt, hvaðani henda skal koma.

Umframt at venja hondbólt tvær ferðir um dagin, skal Gunnleyg arbeiða hálva tíð, so talan verður um heilt aðrar umstøður, enn tær, sum vanliga eru galdandi fyri føroyskar hondbóltsleikarar.

Umframt at luttaka í Íslendsku kappingini, skal ÍBV eisini royna seg í europeiskum høpi, har íslendsku meistararnir skulu royna seg móti einum ungverskum liði.

### Hevði ikki hug

Fyri mong tykist tað kanska løgið, at Annika Ljósstein segði nei takk, tá ein slíkur møguleiki tók seg upp. Sjálv tykist Annika tó ikki at ivast í, at avgerð hennara var røtt.

- Hugurin til at fara var ikki nóg stórur, og tí haldi eg meg hava tikið røttu avgerðina, sigur Annika.

- Vit hava seinastu tvey árini bygt eitt sera spennandi lið her í Klaksvík, og hóast vit nú eru meistarar, so vil eg fegin framhaldandi vera ein partur av hesum liðnum.

- Umstøðurnar og tilboðið úr Íslandi var annars í fínasta lagi, men tá tað kom til stykkis, so var hugurin ikki til staðar, og tí kundi eg ikki velja øðrvísi, hóast tað eru mong, sum hava sagt við meg, at eg havi spilt ein stóran møguleika, sigur Annika Ljósstein at enda.

Hvussu er og ikki, so tykjast hondbóltskvinnur okkara nú at taka upp sama leist, sum fótbóltsdreingirnir hava gjørt seinnu árini, og spennandi verður tí at vita, hvørt hetta eisini fer at koma til sjóndar á landsliðnum, sum eisini hevur spennandi uppgávur fyri framman.



*Komandi árið noyðist Neistin at vera strikuspælaran, Gunnleyg Berg, fyri uttan*